LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein og Uni Arge

# Hvat siga tey um Hanus



Andras Sólstein

## Óvikiligan stíl

Hanus hevur sjáldsama góð evni og ans at velja yrkingar og seta løg til. Løgini hjá Hanus hóska so væl til yrkingarnar, at tú fært illa komið afturumaftur. Hvussu skal t.d. »Áh, kundi á tíðarhavi« syngjast við øðrum lag enn tí hjá Hanusi? Harumframt hevur Hanus sín egna óvikiliga stíl, tá tað snýr seg um tónasmíð, framburð, útsjónd og atburð, og við síni sermerktu songrødd megnar hann at trøllabinda ta stóru fjøldina! Hanus er ektaður og fjálgur, ein sannur fongur fyri Føroyar og føroyskan tónleik! Hjartaliga til lukku, Hanus!



Helena Dam á Neystabø

## Originalur trubadurur

Hanus Johansen er okkara originali trubadurur. Úrmælingur og frálíkur sangari. Eg lærdi hann at kenna saman við »Hundinum Brúna«. Tá var hann í tí skemtiliga horninum. Men Hanus spennir víða, er dapur og yndisligur, fólksligur og serstakur, og hann hevur um nakar víst okkum á ríkidømið í skaldskapinum hjá Poul F. Við sínum trygga gittarspæli og síni mjúku og kensluborni torurødd rúnarbindur henda lítillátaða kempa okkum øll, ung sum gomul.



Jógvan Andrias Joensen

## Smidligur sniðgevi

Hanus dugir sera væl at taka sær av teimum yrkingum, hann fer í hóslag við. Fyrst og fremst tí, at hann tekur tær so nær at sær, sum vóru tær hansara egnu. Og løgini, hann smíðar, um tað er kvæðalag í ætt við góðan gamlan rock ella meira jazzkent, verða hegnisliga evnað til. Tey eru sum búnar av tónum. Hanus er tónasmiður! Hann telgir løg! Smidliga sniðgevur hann løg til eitt nú goymdar og gloymdar yrkingar. Og fleiri hava fingið nýtt lív, ja, hava nærum fingið bein at ganga á ella veingir at flúgva við. Úr tónasmiðju hansara eru løg komin, ið køva hvassan vind, temja illar tungur og fjálga sjálvt hitt kalda lotið.



Jónheðin Tróndheim

## Tann karismatiski

At klára at bergtaka eina mannfjöld í eina heila konsert við einum gittara krevur, at tú ert nakað heilt serligt. Tað er Hanus. Tað eru fleiri, sum eiga gittarar, og fleiri, sum syngja. Men eingin, eg kenni, megnar í fýra tímar at bergtaka áhoyrarar í øllum aldri og frá fleiri ymiskum londum við bert einum gittara og röddini hjá sær. Havi upplivað tað nakrar ferðir og má staðfesta, at hann er so suverent tann mest karismatiski vísusangarin, vit hava. Hann hevur »tað,« sum skal til fyri at síggjast í gráu fjöldini.



Lena Anderssen

## Okkara fagra blóma

Í føroyskum samanhangi er Hanus sum Johnny Cash og Neil Young. Hann sker ígjøgnum vrøvlið og sigur, sum tað er. Hann er bæði vandamikil og skroypiligur. Hann er ein stórur tónasmiður og dugir sera væl at tulka yrkingar. Á palli syngur hann beinleiðis til tín, og tú sleppur ikki undan hansara eygnakasti. Hann er okkara fagra blóma.



Terji Rasmussen

## Tóni og nærleiki

Eg bar oyra við Hanus á fyrstu Frændur-útgávuni, har hann sang »Lívsmynd.« Fall beinanvegin fyri hansara tóna og nærleika. Eg lærdi hann at kenna sama árið, tí vit onkursvegna komu at leiga kamar í somu húsum. Eg var beinanvegin hugtikin av honum og sat ofta í tímavís og nýtti hansara sang og til tíðir brongluta, men altíð væl hóskandi guitarspæl. Vit hittust mangan til hugna í árunum, ið runnu. Hesi seinastu árini hevur tó verið heldur langt millum snapsirnar okkara millum, men hugnaligt er altíð.

Og forrestin Hanus, Paul letur heilsa!